# ABC-formenninir samráðast aftur í dag

**Fundarvirksemi var á Gamla Apoteki og Hafnia allan sunnudagin, og tað heldur fram í dag, mánadag**

SAMRÁÐINGAR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Sunnudagin hittust allar tær nýggju tingmanningarnar á Gamla Apoteki til innanhýsis fundir. Ovast á dagsskránni hjá øllum flokkum var, hvussu nú skal telvast fyri at sleppa í samgongu.

Klokkan 19 sunnukvøldið hittust teir tríggir ABC-formenninir Jørgen Niclasen, Kaj Leo Johannesen og Jóannes Eidesgaard á Hotel Hafnia til fyrsta samráðingarfundin, og teir hittust aftur í dag klokkan 13.30, eftir at blaðið var farið til prentingar. Eingin teirra vil siga, hvørji ítøkilig mál vóru á breddanum sunnukvøldið.



*Teir tríggir ABC-formenninir Jóannes Eidesgaard, Jørgen Niclasen og Kaj Leo Johannesen hittust sunnukvøldið klokkan 19 á Hotel Hafnia til fyrsta samráðingarfundin, og teir hittust aftur í dag klokkan 13.30, eftir at blaðið var farið til prentingar. Samstundis kannar andstøðan, hvørjir møguleikar eru fyri einum nýggjum meiriluta*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Vit tosaðu rímiliga yvirornað og komu við okkara útspæli. Fundurin varð eydkendur av, at vit framvegis eru í fyrstu fasuni, men mánadag verður farið meiri ítøkiligt til verka, segði Jørgen Niclasen eftir fundin sunnukvøldið. Og tað sama segði Kaj Leo sunnukvøldið.

- Nú kanna vit møguleikarnar fyri eini komandi ABC-samgongu, men enn er ov tíðliga at siga nakað ítøkiligt, segði Kaj Leo.

### Andstøðan roynir

Meðan teir tríggir ABC-formenninir fundast sínámillum, roynir Høgni Hoydal, andstøðuleiðari og formaður í Tjóðveldi, at kanna møguleikarnar fyri at sleppa aftur í samgongu. Men hann vil einki siga um, hvørja samgongu hann sær fyri sær, og hvønn samgonguflokk hann hevur tosað við.

- Vit royna við teimum amboðunum, sum vit hava, at lodda dýpið yvir fyri hinum flokkunum. Og eg havi góðar vónir um, at Tjóðveldi aftur kann koma í samgongu, segði Høgni Hoydal sunnukvøldið.

Í dag verður telvað víðari á Gamla Apoteki og Hafnia, men lítið ítøkiligt verður sagt í hesi fyrstu fasuni av samráðingargongdini.

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin